Álit

í

løgtingsmáli nr. 81/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu
(Nútímansgerð og nágreinan av orðskiljingum, broyting í reglunum um handhildna teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum, skeið um rúsdrekka og ferðslu verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni, seta bann fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, har ferðslulógin er galdandi, viðvirkan av dómsmonnum o.a.)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 21. mars 2024 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22. og 29. apríl 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Uni Holm Johannesen, Annika Olsen og Karlot Hergeirsson) hevur hesar viðmerkingar:

Broytingarnar í hesum lógaruppskotinum eru í høvuðsheitum hesar:

1. Stytt heiti á løgtingslógini verður sett inn í lógina
2. Nútímansgerð og nágreinan av orðaskiljingum
3. Ítøkilig heimild hjá løgregluni til atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortskránni hjá Akstovuni
4. Broyting í reglunum um handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól
5. Skeið um rúsdrekka og ferðslu verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni
6. Seta bann fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, sum ferðslulógin fevnir um
7. Viðvirkan av dómsmonnum í nøkrum viðgerðum av brotum á ferðslulógina
8. Tillaging av tænastugjøldum fyri skoðan og umsiting av akfarsskránni

Flestu hoyringarpartar eru eisini í útgangsstøði samdir um, at broytingarnar, íð uppskotið leggur upp til, eru neyðugar, við smærri tillagingum, sum í flestu førum eru tiknar til eftirtektar.

Meirilutin tekur undir við broytingunum nevndar í punkt 1-7 omanfyri uttan aðrar viðmerkingar.

Undir nevndarviðgerðini er spurnartekin sett við, hví tað er neyðugt at hækka m.a. gjøldini til sýn so nógv, sum man hevur valt at gera. Her verður sipað til, at gjøldini fyri umsýn av akførum omanfyri 3.500 kg verða hækkaði úr 100 kr. upp í 500 kr., meðan hækkingin fyri umsýn av persónbilunum verður úr 100 kr. upp í 200 kr.

Hesum er meirilutin partvís samdur í.

Meirilutin tekur undir við, at hækkingarnar fyri sýnsgjøld sambært § 64 a, stk. 2, § 64 b, stk. 2 og § 64 c, stk. 3, sum er fyri akfør við heildarvekt upp til 3.500 kg hækkar við kr. 100,- upp til kr. 200,-. Hetta svarar til eina árliga javning uppá 2,25%.

Fyri akfør við heildarvekt yvir 3.500 kg. verður í lógaruppskotinum mælt til, at gjaldið verður tillagað við kr. 400,- soleiðis at gjaldið frameftir verður kr. 500,-. Orsøkin til broytingina er, at gjaldið skal avspegla tann veruliga kostnaðin av umskoðanini.

Hetta heldur meirilutin er ein ov stór hækking, sjálvt um gjøldini ikki eru javnaði síðan 1993.

Meirilutin setur tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 23 verður í § 64 a, stk. 2, nr. 2 “kr. 500” broytt til: “kr. 350”.

2. Í § 1, nr. 24 verður í § 64 b, stk. 3, nr. 2 “kr. 500” broytt til: “kr. 350”.

3. Í § 1, nr. 25 verður í § 64 c, stk. 3, nr. 2 “kr. 500” broytt til: “kr. 350”.

Viðmerkingar
Við broytingini verður ætlaða hækkingin av gjaldi fyri sýn/umsýn í sambandi við skráseting og góðkenning, ella góðkenning og gjøldini fyri tíðarvissa umskoðan og umskoðan í sambandi við umbidna skoðan av akførum við heildarvekt yvir 3.500 kg broytt til kr. 250,- so at gjaldið verður kr. 350,-.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Talan er um eina røð av broytingum í ferðslulógini. Men tað, sum sker í eyguni, er enn ein hækking av gjøldum, hesaferð í sambandi við sýn.

Sitandi samgonga hevur álagt eina rúgvu av avgjaldshækkingum og lítið skiljandi spariuppskotum.

Bæði persónar og vinna hava staðið fyri skotum.

Fyri persónar:
•Hækkað bensin-og dieselavgjald
•Hækkað brennioljugjald
•Hækkað el-prísin
•Hækkað kringvarpsgjaldið
•Minkað stuðulin til avlamisbil
•Hækkað egingjaldið á heilivág
•Tey allar lægstløntu hava fingið hópin av avgjaldrokningum, men ongan skattalætta. Harafturat velur samgongan at lækka teirra orkustuðul
•Sum einasti bólkur, verður lestrarstuðulin ikki prístalsjavnaður í 2024

•Útvald siglandi hava sum tey einastu, ið arbeiða heimanífrá, mist frádráttir
•Sjómannafrádrátturin er skerdur
•Og frádráttir hjá útisiglarum eru skerdir munandi

Men:
•Vælbjargaði hava fingið stóran skattalætta
•Akademikarar hava í krónum fingið dupult so stóra lønarhækking sum sjúkrarøktarfrøðingar, og Yngri læknar hava fingið tríggjar ferðir so stóra lønarhækking sum sjúkrarøktarfrøðingar
•Sendifólk hava, umframt serskipan av ovurstórari skattafríari viðbót fyri maka og børn, eisini fingið barnafrádrátt

Fyri vinnuna eru rokningarnar stórar:
•Fleirfalding av skattinum á alivinnuna, sum longu hevur kostað 140 arbeiðspláss
•Munandi hækking av tilfeingisgjaldi á fiskivinnuna og teirra manningar, upp í 36% av landingarvirðinum, t.v.s. áðrenn hýrur og útreiðslur
•Revsitiltøk móti Russlandi, sum bara raka føroyska veitaravinnu og tað meint
•Hækkað bensin- og diesel avgjald
•Hækkað brennioljugjald á vinnuna úr 0 upp til 100 oyru/l
•Hækkað tungoljugjald
•Hækkað el-prísin munandi á vinnuna
•Nýtt stórt avgjald á F-gass
•Vinnan skal nú rinda fyri 5 teir fyrstu sjúkradagarnar í mun til 2 áður
•Vinnan skal rinda størri part av løn til lærlingar, tá teir eru í skúla

Minnilutin heldur, at øll átøkini hjá landsstýrinum gera Føroyar til eitt verri og ójavnari samfelag.

Oman á alt hetta skulu persónar og vinna við hesum uppskotinum eisini fáa eina stóra avgjaldshækking á sýn. Akfør hava frammanundan fingið stórar rokningar, og tí er als eingin rímiligheit at koma við enn fleiri hækkingum.

Eisini vil uppskotið føra til enn størri almennar útreiðslur, tí tær 4,5 mió.kr, sum uppskotið væntandi gevur, skulu brúkast til hægri útreiðslur á Akstovuni. Inntøkurnar frá sýnsgjøldum skulu hækka úr 11,1 mió. upp í 15,6 millónir. Ein hækking á 40%, sum øll fer til hægri útreiðslur.

Minnilutin mælir til at broyta uppskotið, so at ásetingar um revsing og avgjaldshækkingarnar verða tiknar úr uppskotinum.

Minnilutin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verða nr. 13, 14, 15, 16, 18, 23, 24, 25 og 26 strikaði.

Viðmerkingar:
Við hesum broytingum verða ásetingar um revsing og avgjaldshækkingar strikaðar, soleiðis at revsing og avgjøld eru tey somu sum sambært galdandi lóg.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 6. mai 2024

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstforkvinna	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Karlot Hergeirsson	